

Samskip í Føroyum bjóðar viðskiftafólki sínum flutnings- og goymsluloysnir við tilhoyrandi tænastum, bæði í Føroyum og úti í heimi. Samskip er partur av Samskip HF. Hjá Samskipum starvast 1.400 fólk á 59 skrivstovum í 23 londum. Samskip hevur tvey skip skrásett í FAS. Tvær linjur sigla uppá Føroyar. Til og úr Føroyum verður siglt til Immingham, Rotterdam, Cuxhaven, Varberg, Aarhus, Reykjavík og Reyðarfjørðin.

## NÝGGJ TELEFONNUMMUR

Vit hava broytt telefonnummarið hjá Samskip frystigoymsluni í Kollafirði. Telefonnummur okkara eru nú hesi:

| | |
|---|---|
| Høvuðsnummar | 30 88 00 |
| Innflutningsdeildin | 30 88 20 |
| Útflutningsdeildin | 30 88 30 |
| Frystigoymslan | 30 88 40 |
| Bingjuterminalurin og koyring í Føroyum | 30 88 50 |

SAMSKIP

Yviri við Strond 23 · 100 Tórshavn · Tel 30 88 00 · Fax 30 88 01 · www.samskip.com

JARÐFEINGI
FAROESE EARTH AND ENERGY DIRECTORATE

## Jarðfrøðingar til Jarðfeingi

Lýst verður eftir tveimum jarðfrøðingum at byrja skjótast gjørligt.

Annað starvið er knýtt at landgrunsverkætlanini, har Jarðfeingi í samstarvi við onnur fær til vegar og fyrireikar próvførsluna, sum skal leggjast fyri landgrunsnevnd ST í tilknýti til áseting av ytra markinum á landgrunsrondini uttan fyri 200 fjórðingamarkið.

Arbeiðið fevnir um ymiskar greinar av havjarðfrøði, einamest um at tulka og í aðrar mátar viðgera seismiskar og aðrar jarðalisfrøðiligar dátur og at skipa tær í ein dátugrunn.

Starvstíðin er treytað av serligari játtan til hesa verkætlan, sum væntandi tekur nøkur ár.

Hitt starvið er tengt at uppgávum, sum Jarðfeingi ger í sambandi við t.d. tunnilsverkætlanir, jarðvandakanningar og vatnkanningar. Hetta arbeiðið fevnir um m.a. jarðfrøðiliga kortlegging, lýsing av borikjarnum, kanning av landslagnum umframt um ráðgeving í jarðfrøðiligum spurningum og uppsøkjandi virksemi í sambandi við nýggjar verkætlanir.

Starvstíðin er m.a. treytað av uppgávunum, sum Jarðfeingi ger fyri onnur, og tað røkkur í fyrsta lagi fram til árslok 2007.

**Krøv til umsøkjarar**
Setanin krevur eina vísindaliga útbúgving innan jarðfrøði. Dentur verður lagdur á, at umsøkjarar hava førleika og royndir innan nýtslu av teldutøkni í samband við greining av jarðfrøðiligum spurningum, umframt góð evni at samstarva í einum tværfakligum umhvørvi.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum avvarandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Umsóknir skulu vera Jarðfeingi í hendi í seinasta lagi 20. okt. 2006. Adressan er: Jarðfeingi, postsmoga 3059, 110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Martin V. Heinesen (martin.v.heinesen@jardfeingi.fo) ella Lis E. Mortensen (lis.mortensen@jardfeingi.fo)

Jarðfeingi - Brekkutún 1 - Postsmoga 3059 - FO 110 Tórshavn
Tel: +298 357000 - Fax: +298 357001 - jardfeingi@jardfeingi.fo



# Starvsfólk til Roknskapardeildina

Søkt verður eftir starvsfólki til Roknskapardeildina hjá Atlantic Airways. Starvið er eitt avloysarastarv, og er tíðaravmarkað til eitt ár.

**Arbeiðið fevnir um:**
Alt vanligt bókhaldsarbeiði.

**Krøv**
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin:
- hevur kunnleika til bókhald
- hevur evni at samstarva og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góðan røkjuskap
- hevur kunnleika til at arbeiða við teldu

Vit bjóða eitt áhugavert starv við nógvum avbjóðingum, og møguleika fyri fakligari og persónligari menning í einum góðum og dynamiskum umhvørvi.

Avloysarin skal setast skjótast gjørligt, og setanartreytir verða avtalaðar nærri við setan.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 19. oktober 2006. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Tórhalli Halgaklett, roknskaparleiðara á tlf. 34 10 35 ella e-mail: torhallur@atlantic.fo.

**Umsóknin skal sendast til:**
Atlantic Airways, Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðari, Vága floghavn, 380 Sørvágur, ella til steinbjorn@atlantic.fo.

www.sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 180 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 378 milliónir krónur í 2005. Atlantic Airways hevur seks flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum | www.flyfaroe.com




Hava tit minst til at goldið haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!

Tórsgøta 1 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo | Sosialurin